


# Fulltrúar til Kappingareftirlitið

Kappingareftirlitið

Kappingareftirlitið søkir eftir tveimum fulltrúum til fyrisitingina av Kappingarlógini. Tú kemur at starvast í einum óformligum og dynamiskum arbeiðsumhvørvi. Fulltrúar á Kappingareftirlitinum skulu bæði kunna arbeiða sjálvstøðugt og í toymi, alt eftir hvør uppgávan er.

Á Kappingareftirlitinum verður dentur lagdur á, at tað arbeiði, ið stovnurin letur úr hondum, er á høgum fakligum støði. Tí eggja og stuðla vit starvsfólkum okkara at menna sínar førleikar á øllum økjum.

Vit kundu hugsa okkum umsøkjarar við kandidatútbúgving innan búskaparfrøði, løgfrøði ella samfelagsfrøði.

## At arbeiða á Kappingareftirlitinum

Fulltrúar á Kappingareftirlitinum hava nógvar og ymiskar uppgávur. Ongin uppgáva er heilt eins. Arbeiðsuppgávurnar kunnu t.d. vera:

- At fyrireika og leggja mál fyri Kappingarráðið
- At viðgera kærur frá vinnurekandi og borgarum
- At innsavna og viðgera tilfar um føroyskar marknaðir
- At skriva frágreiðingar um kapping
- At menna kunnandi tilfar og vegleiðingar
- At kunna vinnulív og borgarar um Kappingarlóggávuna

## Førleikar

Umsøkjarar skulu hava kandidatútbúgving innan løgfrøði, búskaparfrøði ella samfelagsfrøði. Umsøkjarin skal hava góð analytisk evni.

## Setanartreytir

Setanartreytir verða eftir galdandi sáttmála við BLF ella annað avvarðandi fakfelag.

Umsókn, saman við prógvum og møguligum ummælum, skal sendast til:

*Kappingareftirlitið*
*Skálatrøð 20*
*Postboks 73*
*FO-110 Tórshavn*

og verða stovninum í hendi í seinasta lagi tann 30. januar 2008.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Terje Sigurðsson, deildarstjóra, á tlf. 35 60 41 og t-post: terjes@kapping.fo ella við Jógvan Thomsen, stjóra, á tlf: 35 60 21 og t-post: director@fse.fo

Kappingareftirlitið skal saman við Kappingarráðnum umsita løgtingslóg nr. 35 frá 3. mai 2007 um kapping.

Lógin hevur til endamáls, við virknari kapping, at fremja fulldygga samfelagsliga tilfeingisnýtslu til gagns fyri fyritøkur og brúkarar.

## Kappingareftirlitið hevur til uppgávu:

- at vera skrivstova hjá Kappingarráðnum
- at fyrireika tey mál sum skulu leggjast fyri Kappingarráðið
- at útinna avgerðirnar hjá Kappingarráðnum
- at hava um hendi dagligu umsitingina av kappingarlógini
- at taka avgerðir vegna Kappingarráðið í málum í samsvari við vanliga siðvenju og vegleiðing frá Kappingarráðnum